DAGSINS MEINING

Semja – elvir til størri illgruna

Nevndin fyri p.f. Norðoyatunnilin skal hava ein nýggjan formann. Hetta hevur Vinnumálastýrið ikki avgjørt. Men arbeiðsgevarin hjá stjóranum í SEV. Orsøkin, soleiðis sum tað hevur verið lagt út frá umboðsnevndarformanninum sjálvum: hann dugdi ikki at skilja millum starvið sum stjóri í el-felagnum og sum formaður í nevndini fyri p.f. Vágarunnilin.

Fram er komið, at stjórin í SEV hevði gegnistrupulleikar. Hann var inhabilur. Tað hevur SEV-stýrið staðfest og stýrið hevur átalað stjóran. Fram er eisini komið, at alt er ikki farið rætt fram. Neyðaggregatið er dømi um tað. So kunnu vit sjálvandi gera okkara egnu metingar og leggja tað í hetta sum vit nú halda.

Men fólksins umboðsmaður í el-málum, Hans Tausen Olsen, tók eftir øllum at døma ábyrgd sína í stórum álvara. So stórum, at hann kravdi eina løgfrøðiliga kanning. Um ikki, hótti hann við at kalla umboðsnevndina inn. Umboðsnevndin er hægsta valdið í SEV. Tað er hon, sum setir stjóran. Og tað er hon, sum velur stýrið. Ikki øvugt.

Men hví bardist stýrið í SEV soleiðis sum tað framgongur av viðgerðini í miðlunum sum úlvur á skóg ímóti eini kanning? Er tað ikki so? Og hví hevur umboðsnevndarformaðurin, Hans Tausen Olsen, latið sær lynda eina semju, tá ivamál um skeiva framferð eru reist? Har m.a. hann sjálvur hevur reist hesi ivamál! Og hví verður umboðsnevndin ikki kallað inn, um málið er so álvarssamt sum formaðurin hevur vist á!

Tað er frálíkt, at SEV fær sær betri og tryggari mannagongdir? Men ivamálini eru ikki loyst við eini semju um nýggjar mannagongdir og at SEV-stjórin ikki skal vera formaður í nevndini fyri Norðoyatunnilin. Hann er kanska góður sum formaður í slíkari nevnd og hevur gjørt eitt frálíkt arbeiði? Hvør veit?

Men hevur hann gjørt nakað, sum ger, at hann ikki kann halda fram sum formaður í einum heilt øðrum partafelagi enn tí felagnum, har Hans Tausen Olsen setir spurnartekin við arbeiðslag og gegnið?

Eftir tíðindainnsløg og blaðgreinir er illgruni sáddur. Og illgrunin fær føroyingar at spyrja, um nakað er galið? Og hvat er galið? Men tað verður ikki kannað! Tí nú er semja gjørd um ikki at gera eina kanning, sum umboðsnevndarformaðurin annars sjálvur legði upp til. Úrslitið er, at illgrunin verður hangandi. Og verður SEV-stýrið ikki fongt við sama illgruna, tá tað ikki vildi hava eina kanning?

SEV skuldi verið okkara mest fólkaræðiligi felagsskapur. Men el-felagið hevur ferð eftir ferð staðfest, at tað er ein "statur í statinum". Aftur hesuferð. Fjølmiðlar reistu málið. Men klára fjølmiðlar at fáa nakað nýtt, sum avdúkar skeiva framferð, fram á blaðsíður, á skýggjan ella gjøgnum hátalaran?

Hetta eigur ikki at verða gjørt til eitt persónsmál. Tað eru tey, sum halda og vita, at stjórin í SEV sum formaður í Vágatunlinum hevur gjørt eitt sera stórt og gott arbeiði. Og tað eru tí eisini tey, sum fegin siggja, at hann sleppur at royna seg í Norðoyartunlinum eisini. Vit mugu vit kortini rudda av vegnum ivamál og gegnistrupulleikar. Vit mugu ikki vera bangin fyri at tosað opið um slík mál. Og vit mugu loysa tey til okkara alra felags besta.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tilráðing um tal av nevndarpostum

Reidar Nónfjall

Seinastu tíðina hevur staðist nógv kjak um m.a. tal av nevndarpostum hjá stjóranum á SEV. Eg skal við hesum í stuttum greiða frá, hvat altjóða tilráðingar vísa á, um tal av nevndarpostum. Upplýsingarnar kunnu brúkast, sum vegleiðing hjá teimum, sum eru ella eru um at koma í eina ivasama støðu, hvat viðvíkur tal av nevndarpostum.

Tað er týdningarmikið, at einstaki limurin framman undan eitt nevndarval ger sær greitt, hvat tíð nevndararbeiðið tekur, og hvat tíð tað krevur til fyrireiking.

Nýggjastu altjóða tilráðingarnar vísa á, at ein limur, sum eisini er stjóri ella leiðari í einari virknari fyritøku, ikki eigur at hava meira enn *3 vanligar nevndarpostar, ella 1 sum formaður og 1 sum vanligur limur.* Bara serligar umstøður gera, at víkjast kann frá hesum.

Roknað verður við, at talan er um professionelt nevndararbeiði og at nevndarlimir taka nevndararbeiði í álvara.

Yvirlýsing frá Tjóðveldisflokkinum

Tjóðveldisflokkurin stuðlar grønlendska kravinum um fullan avgerðarrætt í hernaðarmálum og mótmælir hjálandapolitisku framferðini hjá donsku stjórnini í málinum um Thule-støðina.

Danska stjórnin hevur - hóast mótmæli frá øllum grønlendskum flokkum - av sínum eintingum boðað amerikonsku stjórnini frá, at hon vil viðgera málið um missil-verjuskjøldur við vælvild. Harvið hevur hon aftur bjóðað Thule-støðina í Grønlandi fram, uttan at grønlendska fólkið er eftirspurt.

Nýggjar frágreiðingar hava staðfest, at hetta er sami framferðarháttur, sum hevur verið føroyingum fyri í hernaðarmálum undir kalda krígnum.

Alt bendir á, at Danmark við hesum aftur brúkar Grønland til tess at vinna sær sjálvum fyrimunir í NATO og til tess at fáa vælvild úr USA í royndunum at vinna sær ein sess í trygdarráðnum hjá ST.

Grønlendskir politikarar hava kravt, at avtalan frá 1951 um Thule-støðina, sum hevur verið hildin loynilig fyri grønlendingum í mong ár, verður endurskoðað, og at grønlendingar sjálvir samráðast og taka avgerðir um hetta mál. Teir gera somuleiðis vart við, at teir búskaparligu og politisku fyrimunir, ið kunnu fáast burturúr eini avtalu við USA og NATO, skulu koma grønlendingum beinleiðis til góðar.

Beinleiðis spurdur á fólkatingi mikudagin, vildi danski forsætisráðharrin ikki vátta, at grønlendsku ynskini fara at verða eftirlíkað ella hoyrd. Hann nevndi tað "ein hypoteiskan spurning", at grønlendingar ikki fóru at taka undir við danska framferðarháttinum.

Tjóðveldisflokkurin stuðlar fult og heilt grønlendsku krøvunum um fullan sjálvsavgerðarrætt í hernaðarmálum og mótmælir teirri hjálandapolitisku framferðini hjá donsku stjórnini seinastu dagarnar. Tjóðveldisflokkurin heitir á donsku stjórnina um í verki at vísa virðing fyri grønlendsku tjóðini og fólkavaldu myndugleikum hennara.

Tórshavn 15. november 2002

Vegna Tjóðveldisflokkin

Høgni Hoydal
formaður
Heini O. Heinesen
form. í tingbólki
Tjóðveldisfloksins

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjáplass má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ein nevndarformaður og annar ella Harra Klæmint og *populitikararnir*

Heini Olsen

Um verandi formaður í gamlari, politiskt valdari **umboðsnevnd** ikki sjálvur ber seg undan afturvali, verður nýggjur formaður bert valdur, um hesin í orð og tal megnar sannføra ein meirluta av nevndarlimunum um, at hann sjálvur bæði er betur hóskandi enn verandi formaður, og at hann í heila tikið er hin besti av teimum øllum.

Ein **verkanevnd** kann eisini vera politiskt vald; men vanliga eru tað áhugabólkar, sum heita á álitisfólk um at manna nevndina, sum so sjálv skipar seg við formanni, skrivara o.s.fr.v., t.e. eingin av limunum hevur sjálvur av fyrstan tíð stillað seg upp til val.

Verkanevndin í Vágatunlinum er í so máta eitt klassiskt dømi. Neyvan man nakar av limunum sjálvur hava biðið sær sess, og skulu teir í okkara pinkusamfelag fyrst noyðast kanna út í æsir, um vandi er fyri, at teir onkursvegna kunnu koma sær í ógegn, hevði neyvan nøkur nevnd nakrantíð verið mannað her á landi, tí vit munnu helst hava minsta fólkatilfeingi í heiminum í mun til tað virksemi, sum tíbetur mestu tíðina fer fram.

Fjølmiðlarnir eru í teirri trongstøðu, at teir skulu fáa til vega tíðindi hvønn einasta dag, onkur teirra fleiri ferðir um dagin. Samstundis varðveita teir Føroya nýggjari søgu, og við hvørt duga teir eisini peika á brek í samfelagnum, sum eiga at verða rætta.

Alt gott um tað at siga; men trupulleikin er tann, at stundir ikki eru at kanna, hvussu nógv tíðindini hava uppá seg, áðrenn tey sleppa út, og her eiga vit øll at hjálpa teimum við fyrst at royna at sálda frá, áðrenn eisini vit sjálvi við gyltari sjálvgleðiskrúnu fara upp í *populitiska* hópin at galdra: *krossfest - krossfest!*

SEV-stjórin hevur nú virkað í mong Harrans ár, hetta bæði í góðum og - ikki minst - í ringum tíðum, og man hann í starvi sínum hava verið rættiliga *gegnligur,* annars hevði hann neyvan verið valdur í nevnd sum álitismaður og av nevndini til formann.

Mær vitandi hevur SEV-stýrið heimild at virka eitt fýra ára skeið í senn, hetta líka til næsta val. Somuleiðis hevur stjórin fingið heimild at arbeiða eftir besta førimuni innan ávísar karmar, sum hann nú verður ákærdur fyri at hava brotið; men fyri mær er ilt at síggja, hvør brotsgerðin man vera.

Eftir øllum at døma hevur hann í hesum føri keypt tann partin av trygdarútgerðini, sum SEV átti sína ábyrgd av, og kenni eg Klæmint rætt, man motorurin neyvan vera heilt óbrúkiligur.

Hví hann nu knappliga skuldi kalla stýrið ella kanska alla umboðsnevndina saman til júst hesa avgerðina av mongum, dugi eg ikki rættiliga at skilja. Hvussu hevði tað verið umrødt, um nú trygdarútgerðin ikki var keypt, áðrenn tunnilin alment varð tikin í nýtslu ?

Við so bábelskari samanseting sum í Vágatunlinum, hevur tað ikki verið nøkur bloyta, íð sitið hevur sum nevndarformaður at taka dagar ímillum okkum sjálvi og útlendskar entreprenørar, so eyðmjúkir hesir í fyrsta umfari annars kunnu tykjast vera, og við hansara royndum - góðum sum ringum, eitt nú við tí elektriska undirentreprenørinum - hevði tað verið harmiligt spell fyri Norðoyatunnilin og allar Føroyar, um henda vitan harra Klæmints bert varð kveistra til viks.

Hetta er sum kunnugt tíverri ikki eindømi í nýggjari tíð.

Vit hava brúk fyri øllum, vit eiga og hava bart út ikki ráð til at blaka meira fyri bakka, enn vit hesi árini longu hava gjørt.

Eftir 12-15 árum í sonevndum **menningarlondum** - Føroyar ikki íroknaðar - siti eg við eini ófrættukenslu av, at vit so smátt nærkast hesum tilafturskomnu, sum, hóast gott vit og skil, neyvan tora kasta sær av vatninum uttan eftir harraboðum, tíansheldur seta spakan í.

Um kostnaðin um Sundið kann bert sigast, at hann er eitt nágreiniligt úrslit av lógtingslógini og sostatt í lagi, men samstundis júst ein av fleiri vansum, eg vísti á í *"Viðmerkingar til uppskot til lógtingslóg um fast samband um Vestmannasund, dagfest 20.08.1999"* - stívar 3 bls. til støddar.

Grønt alternativ í Føroyum

Hans Birgir Hansen

Tað er við eini samskipan av náttúru og umhvørvis-,og djóra- og plantuvernd at vit kundu skapt fortreytir/grundarlag fyri grønari grasrótarørsku við grønum felagsskapum aftur at!

Vit kundu síðani fingið ein grønan felagsskap aftan fyri ein nýggjan politiskan flokk kallað „Tey grønu í Føroyum", ið ein áður í seinru helt av áttatiárunum var alment frammi við.

Tað, at ein í seinri helt av áttatiárum var frammi við tí grønu hugsjón og stevnu og virkisskrá, skapti stóran ans, tá talan er um at marknaðarføra Føroyar innan ferðamannavinnu.

Tað er ein slíkur í er einasta grøna alternativi til teir etableraðu politisku flokkar í øllum tí rikna lands- og kommunalpolitikki á løgtingi og bygdar- og býráðum um alt landið.

Tað finnast møguleikar til teir etableraðu møguleikar, við at gerast sjálvstøðugur og sjálvstøðugt vinnurekandi, við at sleppa politisku ideologiunum og ismunum.

Tað er eingin av etableraðu politisku flokkunum, ið klárar at praktisera grønu hugsjónina, ið byggir á náttúru-, og umhvørvis-, og djóra- og plantuvernd og á medmenniskju.

Tað er nógv almenningurin í Føroyum kundi lært av Teimum grønu flokkunum í londunum uttan um Føroyar, og av náttúru- og umhvørvisfelagsskapum á sama hátt í dag.

Tað er eingin av etableraðu politisku flokkunum og lands- og kommunalpolitikarar, ið hava tær røttu hugsjónir og atburð, hugburð og málburð til at taka lut í slíkum í dag.

Tað er eingin av áðurnevndu, ið eru stagnerað ir í sínum fortreytum/grundarlagi/politisku dieologium/ismum, ið hava innlit/forstáilsi/tilvitan til tað samanhangandi í dag.

Tað er eingin uttan undirritaði, ið hevur samband við „Tey grønu" uttanlands, og eg umboði framhaldandi tað nýggjastu orkusparandi teknologi dana V.H. Flach, sála.

Tað skapar dagliga gerandistrupulleikar at fáast við ein hóp av býttlingum og ørvitisknokkum, almenningurin og blað- og fjølmiðlafólkini í Havnini, ið eru samansvorin.

Hesi eru øll í somu støðu sum tey vælbjargaðu í talu og skriva ímóti betri vitanum, uttan at hava egnu sjálvstøðugar, hugsjónir í øllum tí dagliga gerandislívinum.

Hetta ein ein veruleiki innan blað- og fjølmiðlaheimin í dag.

Juliannuboysarnir Árni og Marnar Andreasen við nýggjari fløgu

FLØGUÚTGÁVA
Tíðindaskriv

Nýggj fløga við eldri áhugaverdum Føroyskum slagarum verður í sølubúðunum síðst í november. Fløgan nevnist »Skýmingstund«. Eisini er gjørt pláss fyri nøkrum útlendskum sangum, ið føroyingar hava tikið til sín, sjálvsagt eru hesir klæddir í ein Føroyskan málbúna.

Tvíburðarnir hava ferðast landið á tamb, og ikki er nakað pláss, har teir ikki hava hugtikið tann dansandi, við teirra tvírøddaðu framførðslu av júst teimum mongu slagarunum, ið eru á fløguni.

Hetta má metast sum ein rein føroysk dansifløga, har teir eru trúgvir móti tí uppruna, sangirnar eru sprottnir úr. Ikki ov nógv spæl fyri gallarínum men eitt siktið beint inn í teir inniligu hjartastreingirnar.

Nakrir av sangunum hava verið á øðrum útgávum í Føroyum, men eisini sleppa Keld Heick, Everly beiggjarnir og hvalbiar brøðurnir við sínum íkasti. Ein sangur, sum hevur verið og framvegis verður nógv nýttir, tá fólk koma saman at hugna sær, er norski Skjønne Helen. Nú verður so møguligt at hoyra hann á føroyskum. Munnu tvíburðarnir hjá Julionnu ikki fara at vinna mong hjørtu við honum, hóast vælvitandi, hvussu vanabundnir okkara landsmenn eru.

Eitt annað, ið er áhugavert, er at øll framleiðslan verður avgreidd í Føroyum. Fløgan er innspæld í M"as Blues Band upptøkuhøllunum í Tórshavn.

Reproarbeiði og prent verður somuleiðis gjørt í býnum. Sjálva framleiðsluna av fløguni hevur Regin Bjarnastein um hendi. So tað er ikki neyðugt at fara út um landoddarnar í nøkrum av lutunum av hesari fløgu.

Hetta er fyrstu ferð, at Árni og Marnar geva út fløgu. Teir hava tó verið við á ymsum bondútgávum m. a. Black Birds. Tað er Árni, ið hevur leikt tey flestu ljóðførini, aðrar góðar kreftir hava eisini gjørt sítt íkast fyri at fløgan kann gerast so góð sum møguligt.

Petur Hermansen á steelguitar og Hans Andrias Højgaard úr Twilight á tangentum, fyri at nevna tveir.